

# Aftur stór lækking í oljuprísinum í dag

**Jógvan Hugo Gardar**

06.01.2015 - 15:44

Oljan.fo

Oljuprísurin lækkar aftur í dag og dregur eisini virðisbrævamarknaðirnir við sær. Um allan heim koma tekin í dag um at oljuprísurin ikki steðgar á at lækka. Ræðslan fyri hvat sum hendir við evruni ávirkar oljuprísin, og tað sama sæst aftur á virðisbrøvunum bæði í Evropa og í Asia.

Keypsskálarnir um alt Asia, úr Tokyo, til Hong Kong og Seoul, vístu allir pílar lækkandi virðir á partabrøvunum tá keypsskálarnir stongdu í dag.

Hitoshi Asaoka sum arbeiðir hjá Mizuho Trust & Banking Co, sigur sambært offshore.no, at japansku virðisbrøvini fylgdu evropeisku lækkingini í gjár. Orsøkin til hetta tykist at vera oljuprísurin sum heldur fram at lækka, samstundis sum støðaan hjá evruni tykis ógreið, nú landið kann velja at fara burturúr evrusamstarvinum.

Oljuprísurin hevur lækkað nógv í dag. Norðsjóvaroljan lækkaði við næstan seks prosentum í gjár, men lækkingin helt fram í morgun, og seinnapartin var prísurin lækkaður við núggjum 2,5 prosentum, og lá beint aftaná døgurða á 51,8 dollarum fyri fatið.

Amerikanska lættoljan verður seld fyri ein prís sum er væl niðanfyri 50 dollarar fatið.